## Oljan framvegis oman fyri 140

Hóast prísurin er lækkaður nakað síðani í gjár, so er prísurin á eini tunnu av ráolju framvegis oman fyri 140 dollarar. Óttin fyri einum álopið á Iran heldur tó framvegis eitt ávíst trýst á prísunum. Óttin fyri kjarnorkuframleiðslu í Iran ber við sær, at eitt álop kann koma upp á tal, og hett kann aftur órógva oljuframleiðsluna í landinum. Mánadagin rakti oljuprísurin sítt fyribils hægsta – 143,67 dollarar fyri tunnuna – tá amerikonsk embætisfólk aftur tosaðu um herd tiltøk mótvegis Iran. Í morgun kostaði ein tunna av olju 140,55 dollarar.



## Bíðitíðin á Klaksvíkar Sjúkrahúsið verður nú longri

Heri Ellingsgaard, umsjónarmaður á Klaksvíkar Sjúkrahúsið sigur, at ætlaðu sparingarnar sjúkrahúsinum merkja at ferðin sum heild verður sett niður. Við Norðlýsið sigur hann, at eingi starvsfólk verða søgd úr starvi, men at ymisk arbeiði verða útsett. Deildir verða samanlagdar og stongdar, og sum stjórin tekur til: Tað sum kann bíða, sleppur at bíða!

# Hetta verður ein harður

**- Kreppan í fiskiflotanum verður ein harður umgangur nógva staðni í landinum, men hetta eitt gott høvi til at minka fiskiflotan og laga hann til fiskastovnarnar, sigur stjórin í Vinnuhúsinum**



*- Hendan næsta tíðin verður hørð nógva staðni í landinum, men politikararnir kunnu bøta um støðuna í harðast raktu økjunum við at raðfesta almennar íløgur frammaliga í teimum pørtum í landinum, sum verða ringast fyri av arbeiðsloysi, sigur Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum*

FISKIVINNUKREPPA

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Vit halda ikki, at tað er rætt at geva fiskiflotanum almennan stuðul av nøkrum sum helst slagi.

Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum sigur, at av prinsipiellum orsøkum er Føroya Arbeiðsgevarafelag ímóti at lata vinnuni stuðul og sostatt heldur felagið eisini, at tað er skeivt at geva fiskiflotanum almennan stuðul, hóast hann nú er í kreppu.

Tí heldur hon, at vit skulu brúka hetta høvi til at lata fiskiflotan laga seg til og finna sína náttúrligu støðd og samanseting, so at tað verða tey mest rationellu skipini, sum verða eftir.

Hon sigur, at tað, sum umrætt, er sjálvandi at fiska tað nøgdina, vit skulu hava burtur úr stovnunum, so effektivt, sum gjørligt.

Ì hesum sambandi nevnir hon teir stóru lemmatrolararnar.

- Upprunaliga komu teir í flotan við tí endamáli at fiska á djúpum vatni eftir kongafiski, blálongu, svartkalva og øðrum fiskasløgum uttanfyri sjálvan landgrunnin.

- Tað var eisini teirra høvuðsveiða í nógv ár. Men tað er tað ikki longur, tí nú eru eisini teir stovnarnir illa fyri. Sostatt hevur fiskiskapurin hjá lemmatrolarunum flutt seg og nú dúva teir mest upp á upsan.

- Spurningurin er so um tað er mest rationelt at fiska upsa við teimum stóru lemmatrolarunum, sum brúka ógvuliga nógva olju, ella um tað er rationellari at fiska hann við øðrum skipum, sum eru bíligari í rakstri.

### Ein harður umgangur

Stjórin í Vinnuhúsinum sigur, at kreppan, sum okkara fiskifloti er komin í, er uppstaðin hetta seinasta hálva árið, nú oljuprísirnir eru farnir til himmals.

- Broytingin í fiskivinnuni hevur verið so ógvuslig og brádlig, at tað kann ongin vinna laga seg til.

Og hon ivast ikki í, at tann tillagingin, sum nú skal til, verður ein harður umgangur, bæði hjá fiskivinnuni sjálvari og hjá samfelagnum annars. Ikki minst verður tað ein harður umgangur hjá teimum økjum úti um landið, har fiskivinnan er stór.

Hinvegin staðfestir hon eisini, at tað hevur altíð gingið upp og niður í fiskivinnuni.

- Í løtuni eru vit í einum aldudali við vánaligum fiskiskapi, lágum prísum og dýrari olju, men um eitt ella tvey ár, kann støðan vera heilt øðrvísi.

Men hon heldur eisini, at tað almenna kann taka tann harðasta stoytin við at leggja tær almennu íløgurnar, har kreppan í fiskivinnuni rakar harðast.

- Tað er vanligur fíggjarpolitikkur, at økja um íløgurnar í vánaligum tíðum og at halda aftur í góðum tíðum.

- Sum støðan er í løtuni, kunnu umraðfestingar gerast í íløguætlanum so at tær íløgur sum ætlanin hevur verið at gera úti um landi verða raðfestar meira frammaliga nú enn áður.

- Sum støðan er nú, hava politikararnar møguleika at raðfesta tey økini frammaliga, sum eru harðast rakt av kreppuni í fiskivinnuni. Verða íløgurnar øktar úti um landið í teimum økjum, sum eru meinast rakt av kreppuni í fiskivinnuni, hevur fólkið har framvegis ein inntøkumøguleika.

Marita Rasmussen heldur eisini, at tá ið almennu íløgurnar verða raðfestar, er eisini neyðugt at hugsa um, at talan verður um íløgur, har fólkið á staðnum hevur møguleikan at vera við.

- At bora tunlar skapar eisini nakað av virksemið, men tað eru fyri ein stóran part útlendsk feløg, sum standa fyri teimum arbeiðnum og tí er avmarkað, hvat liggur eftir av